## 100 ára føðingardagur:

# - Hví vaktu tit meg ikki fyrr í morgun?



**– Tá ið Alma Frederiksen vaknaði heldur seint í morgun, spurdi hon, hví vit ikki høvdu vakt hana fyrr. Jú, lagið er gott. Hon er væl fyri og er ógvuliga glað og takksom fyri dagin í gjár, siga tey á Ellis-og Avlamisheiminum í Vágum**

100 ár
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár var stórur føðingardagur hildin á Ellis-og Avlamisheiminum í Vágum.

Føðingardagsbarnið var Alma Frederiksen, sum 11. september fylti 100 ár.

Dagurin byrjaði við gudstænastu klokkan 10.30, har David Johannesen, prestur, prædikaði fyri Almu, børnum hennara, sum øll vóru hjástødd, búfólkum og starvsfólkum á heiminum.

Um middagsleitið bjóðaði Ellis-og Avlamisheimið føðingardagsbarninum, børnum hennara saman við búfólki og starvsfólki døgurða, og døgurðin var júst eftir ynskjunum hjá Almu sjálvari.

Henni dámar ógvuliga væl fleskasteik og sitrónfromasju, og hetta var eisini matarskráin.

Undir borðhaldinum segði Alma Frederiksen, sum eftir høga aldrinum er rættiliga væl fyri, nøkur orð, har hon takkaði fyri døgurðan og tað, sum tey høvdu gjørt burtur úr.

### 250 fólk

Tann almenni parturin av føðingardegnum var millum klokkan 15 og 18 í gjár.

Úr Vágum verður sagt, at eini 250 fólk nýttu høvi at heilsa Almu og familju hennara á degnum.

Millum tey mongu vóru løgmaður, Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm og borgarstjórarnir í Vágum, Napoleon Magnusen úr Miðvági, Jákup Súni Lauritsen úr Sørvági og Rósa Samuelsen úr Sandavági.

Onnur umboð vóru eisini fyri tað almenna, og Alma fekk bæði heilsanir, blómur og onkra peningagávu.

Øll tey mongu, sum nýttu høvi at heilsa føðingardagsbarninum, fingu gott smyrjibreyð, kaffi, te og køkur.

Stórar køkur vórðu bornar á dyrnar, sum settu sín dám á fjølbroytta køkuborðið.

### Alma takkaði

Undir borðhaldinum vóru røður og sangur, og eisini her nýtti Alma høvi at siga nøkur orð.

Hon takkaði fyri alt, sum fólk høvdu gjørt burtur úr degnum, og hon takkaði øllum teimum mongu, sum komin vóru at heilsa henni.

Ein serstøk tøkk fór til løgmann fyri vitjanina, og tað er ikki undrunarvert, tá ið onkur hevur sagt okkum, at Alma áður hevur verið stillari hjá Javnaðarflokkinum.

Í røðu síni segði Alma eitt sindur um langa lívið hjá sær, sum hevur havt eitt sindur av hvørjum við sær, bæði góðum og minni góðum.

Av níggju børnum, sum hon hevur borið undir belti, eru trý farin.

Øll hini seks vóru við til føðingardagin.

Hon takkaði øllum, sum høvdu gjørt hendan stóra dagin so góðan og hugnaligan.

### Væl fyri

Í morgun, tá ið Sosialurin tosaði við Ellis-og Av-



*Løgmaður heilsar føðingardagsbarninum á 100 ára degnum*



*Mynd: Jens Kr. Vang*